# Fátækadømi og yvirgangur eru ikki tvíburðar

Altjóða yvirgangsmenn hava ikki sín uppruna í fátækradømi ella kíugan. Teir eru vaksnir upp í Vesturheiminum, og teir fara at halda fram við sínum virksemi, sama hvussu nógvar pengar Vesturheimurin nýtir til útbúgving og demokrati í tí arabiska heiminum



*11. september hevur skrivað seg inn í søgubøkurnar sum yvirgangsins dagur*
*Mynd Reuter*

11. SEPTEMBER
*Árni Joensen*

Politikararnir í Vesturheiminum royna ella vilja so fegnir billa sær inn, at áhaldandi menningarhjálp skal fyribyrgja yvirgangi í tí arabiska partinum av heiminum, men hetta er ikki so.

Tað sigur norski professarin Matts Berdal, sum dagliga starvast á krígsgranskingarstovninum á King's College í London.

– Vit eiga at vera sera varin við at siga, at yvirgangur og fátækradømi hoyra saman, tí hetta er ikki so. Fólk, sum eru sera fátæk, verða vanliga sera óvirkin, og tey hava ikki tað, sum ger tey egnað til at vera yvirgangsmenn. So tað er ikki rætt at tvinna hesi bæði saman, sigur Matts Berdal.

Eftir hansara tykki sprettur tann vandamikli yvirgangurin tvørturímóti í sjálvum Vesturheiminum. Hetta eru ungir islamistar, sum eru vaksnir upp her, og sum hava útbúgvið seg her, men sum hava fingið eitt átrúnaðarligt kall, og sum kenna seg kallaðar til at hjálpa eitt nú al-Qaeda og Osama bin Laden, sigur Matts Berdal, og hann er ikki einsamallur um hesa uppfatanina.

– Teir hava góða útbúgving, og tað er ikki ein átrúnaðarskúli, teir hava gingið í. Teir hava einki ímóti McDonald, men vilja hava eitt halal-McDonald. Teir hava heldur einki ímóti cola, bara tað eitur Mekka-Cola og ikki Coca-Cola, sigur Olivier Roy, sum er granskingarleiðari á á einum fronskum stovni.

**Tíðin gongur undan**

Sambært Matts Berdal leggja yvirgangsmenn, sum hava støði í islamismuni, ikki petti í trupulleikarnar við fátækradømi, og menningarhjálp hevur heldur ikki teirra áhuga. Teirra mál er ikki at broyta tær grundleggjandi fyritreytirnar hjá teirra átrúnaðarfeløgum í Miðeystri ella í Asia, men at raka Vesturheimin og at fría tann muslimska heimin fyri tí, teir kalla skaðiliga ávirkan.

Spurdur, um tað er bláoygt at halda, at menningarhjálp kann útrudda ella fyribyrgja yvirgangi, svarar norski professarin:

– Tað er greitt, at tann yvirgangurin, sum hevur sín uppruna í víðgongdum átrúnaði, verður ikki bastur við menningarhjálp. Tað er kanska rætt, at sosialar umstøður hava týdning, tá menn velja at gerast yvirgangsmenn, men eg haldi ikki, at vit eiga at leggja ov nógv í hetta.

Hann ivast ikki í, at avgerðin hjá londum sum Noregi, Danmark, Svøríki og Kanada at veita eitt nú tí arabiska heiminum menningarhjálp við at stuðla teimum hóvligu kreftunum har er vælmeint. Velja vit at svara aftur við hermegi hvørja ferð, er vandi fyri, at vit kvala tær hóvligu kreftirnar, men hinvegin mugu vit eisini viðurkenna, at vit hava ikki somu uppfatan av øllum viðurskiftum, sigur Matts Berdal.

– Tey hóvligu kunnu gera mun, tá um ræður at sannføra hini um, hvør ætlan okkara er, og hvørji virði okkara eru. Men tað er torført at broyta gamla uppfatan. Eitt nú vísti ein meiningakanning í tí arabiska heiminum, at ein meiriluti kendi seg sannførdan um, at tað var ísraelska fregnartænastan Mossad, sum skipaði fyri atsóknunum at USA 11. september í 2001.

Professarin heldur tað vera púra rætt av Vesturheiminum at royna at vinna sær stuðlar í teimum arabisku londunum við menningarverkætlanum og kjaki.

Men úrslitini eru fá og smá, sigur hann og leggur afturat, at í hsum er tað ikki Vesturheimurin, sum hevur góða tíð.

– Vit eiga at gera okkum greitt, at vit standa yvir fyri einari veruligari hóttan, og at tað er ikki nóg mikið bara at leggja dent á útbúgving í tí arabiska heiminum, har yvirgangur verður góðtikin sum eitt vápn, sigur Matts Berdal.

**Kann hjálpa**

Atsóknin at USA vísti, hvussu langt altjóða yvirgangsmenn eru til reiðar at fara, samstundis sum framferðarhátturin vísti, at endamálið var at týna so mong mannalív sum gjørligt. Og hetta er ein álopsháttur, sum altjóða yvirgangsmenn fara at brúka.

– Vit hava fleiri prógv fyri, at yvirgangsmenn royna at fáa fatur á hópoyðingarvápnum, og tað er ikki óhugsandi, at tær fara at nýta slík vápn í tí næsta álopinum. Tí mugu vit taka neyðug stig fyri at forða tí, og í so máta virkar menningarhjálp alt ov seint, um ætlanin er at nýta hana fyri at steðga yvirganginum, sigur Matts Berdal.

Hinvegin heldur hann, at í londum, sum mugu sigast at vera á knøunum, kann menningarhjálpin hjálpa. Eitt av hesum londunum er Somalia. Har kundi menningarhjálpin hjálpt, tí tað er júst í slíkum londum, at yvirgangurin kann finna sær gróðrarlíkindi.

– Í 1980-unum fór Vesturheimurin til Somalia, tí fólk vóru í neyð. Í dag áttu vit at gjørt tað sama, men hesaferð fyri at forða yvirgangi, sigur Matts Berdal, professari.

*(Kelda: Berlingske Tidende)*




## 11. september 2001?



*Suni Merkistein, tíðindamaður:*

– Eg minnist, at eg var júst komin heim av morgunvakt á útlandsdeildini í útvarpinum. Eg var so troyttur, at eg fekk mær ein lúr. Konan ringdi so og segði mær, at tvey flogfør høvdu rent inn í World Trade Center. So eg lá faktiskt og svav so søtan, meðan tað hendi.

Mín fyrsti tanki var, at tað ljóðaði óveruligt. Serliga tá ein verður vaktur við slíkum ræðuligum boðum.

Hetta minti einamest um eina undantaksstøðu, og ein spurdi seg sjálvan, um heimurin veruliga er komin hartil, at slíkt veruliga kann henda.

Í eftirtíðini spældi tað ein stóran leiklut. Ein hevði hug at setast aftur frá ætlaðum ferðum í útlandið. Og óttin fyri, at okkurt líknandi fór at henda aftur var har allatíðina. Og er hann framvegis har.

Hetta var tann dagin, at heimurin fullkomuliga broyttist. Tryggleikakenslan hjá einum varð skakað, og hon verður ongantíð tann sama aftur. Tað er púra vist.

Alt gongur sjálvandi yvir, og lívið verður normaliserað, men á ein ella annan hátt brast okkurt sakloysi í heiminum hendan vanlagnudagin í 2001.

*Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna:*



– Tað minnist eg so sera væl. Eg stóð á tíðindadeildini í útvarpinum og hugdi at live myndum frá CNN, meðan tað seinna flogfarið rendi á World Trade Center.
Nakrir starvsfelagar og eg stóðu og kjakaðust um, hendan myndin mundi vera eftirgjørd, so óveruligt tóktiskt tað.

Tann fyrsti tankin var, at tað kundi ikki passað, at slíkt hendi. Tað kundi simpulten ikki bera til.

Tá so tann fyrsta vantrúgvin hevði lagt seg, gekk ein fyrst og fremst og hugsaði um, hvør kundi finna upp á at gera slíkt. Yvirgangur, var satt at siga ikki tað fyrsta, ið einum kom til hugs.

Og so óttin sjálvandi. Hvat verður tað næsta. Fer kríggj at bresta á ella fer ein heilur herur av sjálvsmorðsbumbumonnum at koma. Nógvar ræðuligar tankar fyltir við einum ávísum ótta.

Tilburðurin fyllir absolutt nógv enn tann dag í dag. Eg haldi ikki, at verðin er tann sama. Tað hava sjálvandi verið kríggj allar dagar, men hetta var jú púra óvæntað, og nakað, sum ein ikki kann verja seg ímóti. Eg haldi, at óttin, sum er um allan heimin í dag, hongur nógv saman við 11. september 2001.

## 11. september 2001

Kl. 13.50:
Eitt flogfar rennir á annað tornið hjá World Trade Center í New York góðar 80 hæddir uppi.

Kl. 14.02:
Meðan sjónvarpsstøðirnar senda frá flogvanlukkuni, rennir eitt annað flogfar á hitt tornið hjá World Trade Center. Tað er ikki vanligt, at flogfør flúgva her, og teir fyrstu viðmerkjararnir tosa um, at talan kanska kann vera um yvirgang.

Seinni frættist, at eitt flogfar hevur rent á bygningin hjá verjumálaráðnum Pentagon í Washington, og seinni koma tíðindi um, at eitt fjórða flogfar er rænt, men at tað er dottið niður í Pennsylvania.

Bush, forseti, kunnger, at USA er í kríggi, og at amerikanararnir eiga at fyrireika seg til eitt drúgt og øðrvísi kríggj - kríggið ímóti altjóða yvirgangi.

# Aftur til tað gamla

Fyri teimum flestu amerikanarunum hava tey seinastu trý árini verið ov hendingarík við yvirgangsatsóknum, búskaparligum bakkasti, ósemju tvørtur um Atlantshavið og kríggi. Tilboðið hjá demokratunum er tí at venda aftur til tað gamla

11. SEPTEMBER
*Árni Joensen:*

Aftan á fyrra heimsbardaga vóru amerikanararnir troyttir av kríggi. Ímóti teirra vilja bleiv USA drigið upp í kríggið í teimum fronsku skotgravunum, og tá kríggið loksins endaði, var Woodrow Wilson, forseti, fremsti talsmaðurin fyri at stovna Fólkasamgonguna.

Kríggið gav amerikanarunum eina øðrvísi uppfatan av teirra gerandisdegi, tí brádliga vóru heimsins trupulleikar vorðnir teirra trupulleikar, og nógvir teirra tráðaðu eftir friði, tá kríggið var av.

Tað skilti republikanska forsetavalevnið Warren G. Harding. Á forsetavalinum í 1920 lovaði hann amerikanarunum, at teir skuldu sleppa at venda aftur til tað gamla. Tað gav eisini úrslit. Harding vann stórsigur á demokratunum.

Í dag er støðan tann øvugta. Hvønn einasta mánað tey seinastu trý árini hava vit havt tilburðir, sum koma at standa í teimum amerikonsku søgubókunum. Búskaparlig afturgongd. yvbirgangur, kríggj í Afghanistan, aftur yvirgangur, kríggj í Irak, diplomatiskt kríggj við Evropa, áhaldandi ávaringar um yvirgang, herseting í Irak og so sjónbandsupptøkurnar av monnum við gekkaskorti og knívi í hond.

– Hetta tíðarskeiðið hevur verið spennandi, ov spennandi, hevur tann konservativi viðmerkjarin Peggy Noonan sagt.

**Sum í 1920**

Tað ber ikki til at lasta Bush, forseta fyri alt tað illa, sum er hent, men summum hevur hann skyldina av, og nú royna demokratarnir at gera tað sama, sum Harding gjørdi á sinni. Teir bjóða amerikanarunum at venda aftur til tað gamla.

Á landsfundinum hjá demokratunum herfyri gjørdu tveir fyrrverandi forsetar, Jimmy Carter og Bill Clinton, nógv burtur úr júst hesum spurninginum.

– Vit royndu teirra politikk í tólv ár, síðani royndu vit okkara politikk í átta ár, og nú hava vit aftur roynt teirra politikk í fýra ár. Tað avgerandi er, at fólk hava tað betri, tá stjórnarskeiðið er av, og í so máta virkar okkara politikkur betur, segði Clinton.

Tann 11. september í 2001 broytti amerikanararnar og tað amerikanska samfelagið. Ta fyrstu tíðina aftan á álopið stóðu amerikanararnir sum ein maður, men sambært Clinton misnýtti Bush støðuna við tí úrsliti, at amerikanska tjóðin sjáldan hevur verið so tvíbýtt sum júst nú.

11. september broytti eisini amerikanskan politikk. Í síðstu øld vóru tað demokratarnir , sum tosaðu um ábyrgd mótvegis umheiminum, meðan republikanararnir hugsaðu um tey heimligu viðurskiftini fyrst. Spurningurin er so, um amerikanararnir eru vorðnir troytytir av kríggi eins og í 1920, og um tað fer at geva sama úrslitið sum tá - bara øvugtan veg.

– Amerikanararnir vilja helst hava spenning í lívinum, men teimum dámar eisini best, at amerikanska søgan er keðilig. Tí vilja nógvir venda aftur til tað gamla, skrivaði Peggy Noonan í Wall Street Journal herfyri.

*(Keldur: Wall Street Journal og Berlingske Tidende)*



*Ikki bert fyri Newyorkarar var henda sjón ógvuslig og ræðulig - hon loypti hvønn á allan heimin*
*Mynd Reuter*